Ivan Johansen Bilar, ISO 9001:

# Fyritøkan heldur góðskustøðið

**Fyri einum ári síðan fekk bilasølan Ivan Johansen Bilar, sum fyrsta bilasøla í Føroyum, altjóða ISO9001 góðkenning. Í september 2004 bleiv skipanin endurskoðað og staðfestast kundi at fyritøkan framhaldandi heldur góðskustøðið, og at tað enn tá er hækkað á avísum økjum**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

ISO (International Standardisation Organisation) er ein altjóða samskipan av ásettum standardkrøvum til góðskuskipanir.

ISO 9001 er ein góðskuskipan sum tryggjar at t.d. ein fyritøka lýkur altjóða krøv, tá talan er um góðsku og tænastu.

Endamálið er fyrst og fremst at nøkta krøvini frá kundunum, og krøvunum sum føroysku myndugleikarnir áseta – umframt at hava greiðar innanhýsis mannagongdir, sigur Áki Andreasen, góðskuleiðari, sum hevur hevur sett skipanina í verk, hjá Ivan Johansen Bilum

Allar innanhýsis mannagongdir eru feldar á blað og allar umvælingar, klárgerðing, rustviðgerð og sølur verða skrásettar og eftirmettar.

Fyritøkan hevur við ISO skipanini eisini fingið fastar mannagongdir, tá talan er um viðurskifti sum t.d. starvsfólkapolitikk, samstarvsavtalur, hvørjar veitarar fyrtøkan samstarvar við, eftirkanning av teimum amboðum, ið verkstaðurin nýtur, krøvum sum sett verða goymslu og bilasølu, tænastustøði og kundanøgdsemi.

Til dømis útfylla kundarnir eitt oyðublað, har spurt verður, hvat tey hildu um tænastuna tá bilurin seinast var á verkstað, um hann varð væl frágingin, hvussu góðskan var í mun til kostnaðin og um gjørdar avtalur vórðu hildnar.

Sama er galdandi fyri bilasøluna, goymsluna og rustviðgerðina.

Oyðublaðið verður sent ópostað aftur til Ivan Johansen Bilar.

Fyri kundan er hetta ein trygd og tryggjar møguleikan fyri einum sakligum samskifti millum viðskiftafólk og fyritøkuna.

ISO9001 góðkenningin fevnir um sølu og umvæling av nýggjum og brúktum bilum av teirra egnu merkjum, sølu av eykalutum og Dinitrol rustviðgerð av øllum bilum.

Starvsfólkið hjá Ivan Johansen Bilum hava skyldu at fylgja teimum ásetingum, sum eru í ISO skipanini.

Ásetingarnar í góðskuskipanini áseta m.a. at skipanin skal endurskoðast (endurcertifiserast) einaferð um árið fyri at tryggja góðskustøði.

Somuleiðis ásetur góðskuskipanin at góðskuleiðarin allatíðina skal skjalprógva at abeitt verður eftir ásetingunum og at møguligar betringar verða settar á dagsskránna og framdar.

Leiðslan hevur somuleiðis skyldur, tá talan er um ISO skipanina. Nevnast kann útbúgvingartørvur og førleikamenning hjá starvsfólkunum.

Arbeiðsumhvørið hjá starvsfólkunum, umframt at leiðslan hevur skyldu at taka mál upp sum starvsfólk koma við.

Góðskuleiðarin er umboð leiðslurnar hjá starvsfólkunum og umboð starvsfólksins hjá leiðsluni.

Í september 2004 bleiv skipanin endurskoðað av Det Norske Veritas í Føroyum. Staðfestast kundi at einasta ISO góðskugóðkenda bilasøla í Føroyum framhaldandi heldur góðskustøðið, og at tað enn tá er hækkað.

Frits Jacobsen í Kollafirði er settur í starv hjá Ivan Johansen Bilum, og uppgávan hjá honum er m.a. at hava kvalitetkontroll við øllum umvælingum, sum verða gjørdar.

Leiðslan og starvsfólk fegnast um góðskustøði og eingin ivi er um at hetta gagnar bæði starvsfólkatrivnaðinum og viðskiftafólkunum okkara, sigur Áki Andreasen, góðskuleiðari hjá Ivan Johansen Bilum.





*Jón Johansen og Leif Johansen, stjórar, Áki Andreasen, góðskuleiðari og Jógvan T. Joensen, goymsluleiðari við ISO-9001 góðkenningini*




Ivan Johansen Bilar, ISO 9001:

# Frits Jacobsen settur sum kvalitetskontroll

**Frits Jacobsen er settur í starv hjá Ivan Johansen Bilum. Uppgávan hjá honum er m.a. at hava kvalitetskontroll við øllum umvælingum, sum verða gjørdar**

KVALITETSKONTROLL
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

ISO 9001 góðkenningin krevur at kvalitetskontroll er við øllum umvælingararbeiði, sum verður gjørt hjá Ivan Johansen Bilum.

Ein av uppgávunum hjá Frits Jacobsen er at fylgja við meðan arbeiðið fer fram. Síðan skal hann eftirhyggja bilin, tá hann er liðugur, kanna um alt er gjørt, sum tað skal, og royndarkoyra bilin.

Um okkurt brek er við bilinum, sum kundin ikki hevur biðið um at fáa gjørt, verður tað viðmerkt.

Frits er 38 ára gamal og útbúgvin bilmekanikari og maskinist. Hann hevur starvast í bilbranchuni í meira enn 20 ár, og er hann ein royndur maður innan vinnuna. Hann arbeiddi eisini í mong ár sum sjálvstøðugur.




*Uppgávan hjá Frits Jacobsen er m.a. at hava kvalitetskontroll við øllum umvælingum, sum verða gjørdar. Aftanfyri sæst ein bilur hjá Dansk Teknologisk Institut*

*Mynd: Jens Kr. Vang*





Ivan Johansen Bilar, Dinitrol:

# Rustviðgerð – ein spurningur um álit

**Rustviðgerð er í stóran mun ein spurningur um álit millum kundan, og tann sum ger arbeiðið. Dansk Teknologisk Institut gevur Dinitrol rustviðgerðini hjá Ivan Johansen Bilum besta karakter fyri væl úr hondum greitt arbeiði**

RUSTVIÐGERÐ
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Um bilurin skal rustviðgerast og nær er ein spurningur, sum nógvir bileigarar mugu taka støðu til. Um talan er um ein nýggjan bil, sum eftir ætlan skal halda í nógv ár, er eingin ivi um, at tað er best at rustviðgera beinanvegin. Er hinvegin talan um ein góðan brúktan bil, kann ein góð rustviðgerð leingja nógv um livitíðina hjá bilinum.

Sagt verður um rustviðgerð av bilum, at tað er sjáldan ov seint, men ongantíð ov tíðliga at fáa tað gjørt.

Rustviðgerð er í stóran mun ein spurningur um álit millum kundan, og tann sum ger arbeiðið, tí kundin hevur ikki møguleika at kanna eftir, um arbeiðið er væl gjørt.

Hóast bilverksmiðjurnar gera nógv fyri at seta bilarnar so væl saman sum møguligt við m.a. at galvanisera og zinkviðgera plátulutirnar, vísur tað seg, at til okkara váta og saltkenda veðurlag er tað ikki nøktandi.

Tað er Dansk Teknologisk Institut sum stendur fyri hesum eftirkanningunum, ið kallast VKO-R (Værksteds Kontrol Ordning vedrørende Rustbeskyttelse).

Dinitrol rustviðgerðin er góðkend av Teknologisk Institut og verður tilmæld av FDM.

Tað at viðgerðin er góðkend av Teknologisk Institut gevur teimum rætt til at innkalla bilar, ið hava verið til Dinitrol viðgerð, til kanningar.

Tá fólk frá Teknologisk Institut hava verið í Føroyum og kannað bilar, sum eru rustviðgjørdir hjá Ivan Johansen Bilum, hava teir fingið besta karakter fyri væl úr hondum greitt arbeiði.

Tað sum í høvuðsheitum gongur fyri seg undir eini rustviðgerð er, at fyrst verða ymiskir lutir avmonteraðir sum t.d panel og innaru skermarnir, tá tað er gjørt, verður bilurin hátrýstreinsaður og síðan turkaður, og síðan verða holini boraði, bert um tað er neyðugt.

Tá bilurin er turrur, verða tey ymisku Dinitrol-produktini sproytað, har tey eiga.

Síðan verða panel og innarskermar monteraði aftur, proppar settir í holini og bilurin vaskaður og klárgjørdur.

Til hvørt ein einstakt bilmodell eru kort við nágreiniligum upplýsingum um konstruktiónina á bilinum, og hvørji amboð ið skulu brúkast. Alt verður gjørt eftir forskriftunum.




*Kaj Boetius hevur Dinitrol rustviðgerðina um hendi hjá Ivan Johansen Bilum*